Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um avmarkandi tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina
(Víðkaðar heimildir at seta ávís onnur avmarkandi tiltøk í verk mótvegis Russlandi ella Hvítarusslandi, sum hava til endamáls at tryggja frið og trygd ella virðing fyri fólkaræði, rættarsamfelagi, mannarættindum ella altjóðarætti annars, heruppií í sambandi við hybridhóttanir, brot á mannarættindi, o.a.)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 90 frá 17. mai 2022 um avmarkandi tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina, sum broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 22. juni 2023, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:

“Løgtingslóg
um
ávís avmarkandi tiltøk”

2. Í § 1, § 3, stk. 1 og 3, § 4, stk. 1 og 4, § 5, § 6, stk. 2, § 9 og § 11, stk. 2 verður “Landsstýrismaðurin” broytt til: “Landsstýrisfólkið”, og í § 10, stk. 2 verður “landsstýrismaðurin” broytt til: “landsstýrisfólkið”.

3. Í § 7 verður “landsstýrismanninum” broytt til: “landsstýrisfólkinum”.

4. Yvirskriftin yvir § 5 verður orðað soleiðis:

“*Onnur tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina*”

5. Aftan á § 5, men áðrenn yvirskriftina yvir § 6, verður sett:

“*Onnur tiltøk*

§ 5 a. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um onnur tiltøk mótvegis Russlandi og Hvítarusslandi enn tey, ið eru nevnd í §§ 1, 3 og 4 við støði í avmarkandi tiltøkum samtykt av millumtjóða felagsskapum, ella sum hava breiða millumtjóða undirtøku, og sum hava til endamáls at tryggja frið og trygd ella virðing fyri fólkaræði, rættarsamfelagi, mannarættindum ella altjóðarætti annars.”

6. § 8 verður orðað soleiðis:

“**§ 8**. § 18 í løgtingslóg um fyrisitingarlóg er ikki galdandi fyri avgerðir, tiknar sambært reglum, ásettar við heimild í §§ 4 og 5 a, og fyri upptøku av likamligum persónum, løgfrøðiligum persónum, eindum o.ø. á listar sambært § 6.”

7. Í § 10, stk. 1 verður “§§ 3-5” broytt til: “§§ 3-5 a”.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2026.

Samtykt á Løgtingi hin 2. desember 2025 við 17-0-12 atkvøðum.

forkvinna

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 2. desember 2025

stjóri

LM-001/2025